Ísrael í Miðamerika

Um hvussu Ísrael hjálpir harðræðisstjórnum í Miðamerika t fóta sær, við at selja teimum vápn og aðra útgerð.

Ísrael hevur í mong ár verið ein av høvuðsútvegarunum av vápnum til høgravend stýri í Miðamerika.

Tað var í 1950'unum, at Ísrael fór inn í miðamerikanska vápnamarknaðin, har tað seldi stýrinum hjá einaræðisharranum í Nicaragua, Somoza, vápn.

Grundgevingin hjá Ísrael fyri at hjálpa hesum tiltikna harðræðisstýri við vápnum, sum fyrst og fremst vórðu nýtt til at myrða politiskar andstøðingar við, umframt at spjaða ótta og ræðslu millum fólkið0, var henda:

Ísrael segði seg hava eina »søguliga skuld« mótvegis Somoza: Í 1948, tá øll onnur hildu seg aftur, hevði tásitandi einaræðisharrin úr Somoza-familjuni sum hin einasti sent zionistunum vápn.

Stuðlaði harðræðisharra

Ræðuleikarnir hjá Somoza-stýrinum gjørdust gjøgnum 1970-árini teimum flestu ovbodnir. — Ja, sjálvt USA, sum í sínari tíð hevði syrgt fyri, at Somoza-familjan slapp fram at valdinum (1934) — USA, sum í øll hesi ár við figgjarligum og hernaðarligum stuðli hevði hildið Somoza-stýrinum uppi, tók stuðul sín aftur.

Ísrael læt seg tó ikki vika av hesum. Seinastu mánaðirnar hjá Somoza-stýrinum, sum í juli 1979 varð felt av sandinistunum, vórðu tað einans Ísrael og hernaðarstýrið í Argentina, sum sendu Somoza hjálp.

Óbeinleiðis hevði USA ein stóran part av æruni fyri, at hetta kundi lata seg gera hjá Ísrael. »Hernaðarapparatið« hjá Ísrael, sum er eitt tað største í heiminum, kundi ikki og kann ikki liva uttan tann stóra figgjarliga styrkin úr USA.

Økt virksemi

Leiklutur Ísraels í Miðamerika øktist síðst í 70-árunum, tá tað tók við alt fleiri marknaðum, haðani USA hevði tikið seg aftur. Tveir teirra vóru El Salvador og Guatemala, har Ísrael skjótt gjørdist høvuðsútvegari av útgerð til gonguherliðini.

Í Guatemala høvdu mannarættindini havt tað alt annað enn gott undir herleiðaranum Romeo Lucas Garcías, og av hesi orsøk hevði USA í 1977 sett fullkomið bann fyri hernaðarligum stuðli til Guatemala.

Men aftan á kollveltingina í Nicaragua í 1979 varð óttin fyri »nicaraguansku smittuni« stórur. Tað fekk Carter-stjórnina at økja um stuðulin til Ísrael, sum so aftur vaks munandi um styrkin til Guatemala. Umframt økti USA um stuðulin til El Salvador og Honduras.

Nýtt Suðurafrika

Týdningurin hjá Guatemala er vorðin at sammeta við Suðurafrika, hvar israelskum handilsskapi, vápnaútflutningi og stuðli í trygdarspurningum viðvíkur.

Ísraelskir trygdarserfrøðingar og EDV-teknikarar hava bygt upp eina elektroniska eftirlits- og skrásetingarskipan, sum ætlanion er so við og við skal umfata upplýsingar um alt fólkið. (1984).

Somuleiðis hevur Ísrael staðið fyri útbúgvingini og venjingini av forhoyrsserfrøðingum hjá heri og løgreglu. Ísraelskir heryvirmenn vegleiða guatemaltekisku starvsfeløgum sínum í »antiguerillakriggi«. Og mest nýtta skotvápnið hjá herinum í Guatemala er israelska »automatbyrsan« Galil, umframt at herurin ræður yvir øðrum ísraelskum vápnum, granatum og flogførum.

Ein góður vinur

38.000 (átta og tretivu túsund) fólk eru horvin í Guatemala síðan 1954; 10.000-tals einkjur og 100.000-tals foreldraleys liva í størstu neyð og fátækradømi.

Og hóast sivilur forseti er komin til valdið í ár — aftan á 32 ára hernaðardiktatur — halda politiskir andstøðingar o.o. fram við at hvørva. Hetta merkir, at tey eru torturerað til deyðis.

»Guatemala er ein av bestu vinum okkara,« segði ísraelski sendiharrin í Guatemala, Moshe Dayan, í 1981.

Mugu selja vápn ...

»Ísrael hevur ein stóran vápnaidnað, sum má selja vápn uttanlands. Og Miðamerika er ein sera týðandi marknaður fyri vápnaútflutning,« skrivar blaðstórin á »Israeli Foreign Affairs«, Jane Hunter.

Tel Aviv ynskir eisini at vinna sær politiskar stuðlar í hesum øki at seta ímóti arabisku ávirkanini í tríðja heiminum,« greiðir hon frá.

Í 1981 undirskrivaðu Ísrael og USA eina greinagerð um »strategiskt samstarv«. Partar av hesum skjali snúgva seg um at samskipa politikk og vápnasølu í Miðamerika, Afrika og aðrastaðni.

Tekur við, tá USA ikki sleppur

Mossad, ísraelska fregnartænastan, var eisini við í 1981, tá tann amerikanska CIA setti »contraina« a stovn — uppreistrardeildirnar, sum royna at fella sandinistisku stjórnina í Nicaragua.

Fregnartænastan hjá Ísrael var tá við til at venja tær fyrstu contraeindirnar.

Hesi seinastu árini hevur Ísrael í stóran mun økt um virksemi sítt í Miðamerika. M.a. »hjálpir« tað Reagan-fyrisitingini í USA at fáa vápn til vega til »contraina«, tá kongressin forðar stjórnini í at gera hetta.

Um hvussu fyrisitingin hjá Reagan loyniliga fekk í lag vápnasølu til »contraina« igjøgnum Ísrael, tá amerikanska kongressin í 1981 hevði sett stjórnini bann fyri at lata CIA gjalda kriggið hjá contraini, skal verða greitt frá í eini komandi grein.

maj



Meira enn 38.000 guatemaltekarir eru »horvnir«
Avvarðandi til horvnar fangar hava stovnað felagsskapin GAM, sum m.a. við kravgongum roynir at fáa greið boð um lagnurnar hjá teimum horvnu. Her ganga tey við listum við nøvnunum hjá horvnu familjulimum sínum.

Hesin stuðul verður latin gjøgnum US Foreign Military Sales (FMS). Heimild: SIPRI Yearbook 1984)

Studningur og lán úr USA til ísraelsku hermegina:

ár	mió. dollarar
1973	uml. 300
1978	uml. 1100
1983	uml. 1800

Ísraelska hermegin kann ikki liva uttan hjálp úr USA. Umframt hjálpina á hesi talvu, fær Ísrael eisini beinleiðis figgjarliga hjálp úr USA.

Heimild:

— US Guardian 16/4-86
— Noticias de Guatemala, mars 1986
— Jens Lohmann: »Den mellemamerikanske drøm« (1984)

Vit framleiða og selja fyrsta floks vatnleiðingar til rætta prísin

Eisini nógv nýtt til kaðalverju.

Vit framleiða Peh og Pem í 25 — 32 — 40 — 50 — 63 — 75 — 90 — 110 mm við TN6 og TN10.

Vit hava allar rørdeildir á lagri.

Skjóta avgreiðslu og geva óbindandi tilboð.

Heil- og smásøla.

Keypið føroyska framleiðslu

P/f polyoplast
Akranesgøta 9
Tórshavn
Tlf. 1 76 33